

**ÚRSLIT**

*Tað verður veldugt at kunna rógva við nýggja Lómi, sigur Meinhard Akraberg Hansen, sum hevur róð kapp við Argja Róðrarfelag seinastu fimm árini. Tað er bátabyggjarin Sámal Hansen í Runavík, sum hevur gjørt bátin. – Úrslitini skulu nokk koma*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**» At rógva, – tað er helst tað sama sum at roykja. Man blívur avhengigur av tí**

# Taktikk

Tosar ein um at vinna ein dyst í eini ítróttargrein ella eina súkklukapping, er sera týdningarmikið at allir luttakararnir eru samdir um tann lagda taktikkin.

Eisini í rógving verður ein taktikkur lagdur, og sum vónandi ger sítt til, at teir at enda standa sum vinnarar av einum róðri ella róðrarári. Men hvussu leggur ein bátsmanning sín taktikk?

– Sjálvandi royna vit allir at rógva alt tað sum vit eru mentir, og herja á longu frá fyrsta árataki, staðfestir Meinhard. - Og tað er eisini ógvuliga týdningarmikið, at eingin gevur upp. Tað hevur eisini sín týdning, at øll hugsanin er vend ímóti málinum og at teir bert hyggja í nakkan á manninum aftanfyri, og ikki hyggur til viks eftir hinum bátunum.

– Vit knalla eisini til beinanvegin eftir startin, og rógva so okkara róður inn móti málinum, fyri síðani at taka ein ordiligan spurt til seinast, – ein spurt, sum vónandi gevur okkum eitt fyrstapláss, sigur hann brosandi.

Hetta sama ger seg helst eisini galdandi fyri hinar manningarnar, men so er tað eisini altíð ein spurningur um, hvussu ein manning er fyri moralskt, beint áðrenn ein róður.

– Ja, tað er sjálvandi ikki eins stuttligt at rógva, um man hevur skeldast beint áðrenn man skal í bátin, ella um onkur av føstu manningini ikki kann møta tí hann er sjúkur.

– Best er sjálvandi, tá vit allir eru saman til venjing og tá FM-róðrarnir eru, slær Meinhard fast.